UTTAN ÚR HEIMI

## Kann enda við innrás

Amerikanska Senatið hevur við stórum meiriluta samtykt, at USA skal seta tiltøk í verk ímóti Sýrialandi, tí illgruni er um, at landið hjálpir víðgongdum bólkum, sum gera seg inn á amerikonsku hermenninar í Irak, og at landið styðjar altjóða yvirgang yvirhøvur.

Fýra senatorar atkvøddu ímóti tiltøkunum. Ein teirra, demokraturin Robert Byrd, sum er kendur fyri sínar atfinningar at amerikanska politikkinum í Miðeystri, segði aftan á atkvøðugreiðsluna, at tiltøkini ímóti Sýrialandi kunnu elva til, at USA fer at gera innrási landið. Hann grundaði hetta á, at stjórnin kann fara at misnýta samtyktina sum grundarlag fyri einari innrás.

Robert Byrd legði afturat, at hann hevði atkvøtt ímóti tiltøkunum, tí hann hevði ikki sæð nakað, sum prógvar, at sýrialendska stjórnin hevur nakra ábyrgd av álopunum á amerikonsku hermenninar í Irak.

## Dýr hús darva virðisøking

Varastjórin í norska sparikassafelagnum, Kalle Seip, ávarar nú um, at norðmenn seta ov nógvar pengar í fasta ogn.

Kalli Seip sigur, at tað eru umleið tvær milliónir hús og íbúðir í Noregi. Meðalstøddin er 110 fermetrar, og við einum fermetraprísi upp á 13.500 krónur eru húsini og íbúðirnar einar 3.000 milliardir krónur verd. Eins og føroyingar velja norðmenn at búgva í egnum bústaði, og tað ger sambært varastjóranum í sparikassafelagnum, at meðalvirðið á einum bústaði liggur um hálva aðru millión krónur. Kravið um egnan bústað skúgvar prísin uppeftir og darvar samfelagsbúskapinum, sigur hann.

Sambært Kalle Seip er tað ein trupulleiki, at norskir húsaeigarar rinda nógv minni skatt av húsunum og íbúðunum enn av eitt nú partabrøvum. Tann lága rentan skundar undir hesa gongdina, soleiðis at fólk seta ikki pengarnar í tað, sum hevði givið mest av sær í samfelagsbúskapinum, sigur hann við Aftenposten.

## Drupu 12 kvinnur

Løgreglan í Kina hevur tikið ein mann og eina kvinnu, sum eru skuldsett fyri at hava myrt tólv kvinnur.

Sambært almennu tíðindastovuniXinhua heldur løgreglan, at tey bæði fólkini burturfluttu og myrdu tær tólv kvinnurnar í Buji-landspartinum har suðuri í Kina í einum fimm ára skeiði. Tær tólv kvinnurnar vóru farnar at leita eftir arbeiði. Tær komu í samband við tey bæði, sum søgdu seg vera til reiðar at hjálpa teimum at finna okkurt arbeiði, men ístaðin fyri vórðu kvinnurnar burturfluttar og myrdar, sigur løgreglan.

Sambært løgregluni vildu tey bæði skuldsettu hava pengar aftur fyri at hjálpa kvinnunum. Áðrenn tey myrdu kvinnurnar, tóku tey bæði pengar og virðislutir frá teimum.

## Aftur skrivað bók

Norska tíðindakvinnan Åsne Seierstad, sum herfyri gav út bókina "Bókasølumaðurin í Kabul", hevur aftur skrivað bók. Tann nýggja eitur "101 dagar" og er um teir 101 dagarnar, tíðindakvinnan var í Bagdad fyrr í ár. Åsne Seierstad var eitt av teimum fáu vesturlendsku tíðindafólkunum, sum valdi at verða verandi í irakska høvuðsstaðnum, tá kríggið byrjaði.

"Bókasølumaðurin í Kabul" hevur fingið sera góð ummæli og er longu týdd til fleiri mál og útgivin í fleiri londum. Hinvegin eru ummælararnir ikki so samdir um ta nýggju bókina. Summir teirra halda, at hon ber bráð av at vera skrivað í skundi, og at høvundurin fer ov lætt um týðandi smálutir. Teir geva tó ikki høvundinum alla skyldina, men vísa á, at tað ofta eru útgevararnir, sum skunda undir høvundarnar, og at úrslitið ofta er hareftir.

Aðrir ummælarar halda tvørturímóti, at Åsne Seierstad enn einaferð hevur staðfest síni evni sum høvundur.

# Stúra fyri álopi á Bush tá hann vitjar London



*George W. Bush, forseti, kemur til London at vitja í næstu viku*

*Mynd: Reuters*

**Í næstu viku fer amerikanski forsetin til London at vitja. Nú stúra bretsku myndugleikarnir fyri, at al-Qaeda fer at royna at gera seg inn á hann, meðan hann er har**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað er greitt, at fleiri túsund fólk fara at ganga mótmælisgongu í London, tá Bush kemur at vitja, og nú stúrir Scotland Yard fyri, at limir í yvirgangsfelagsskapinum al-Qaeda fara at blanda seg upp í mótmælisfólkið við tí fyri eyga at gera seg inn á forsetan.

Trygdartiltøkini í sambandi við vitjanina hjá amerikanska forsetanum verða so umfatandi sum ongantíð fyrr, men sambært blaðnum The Times stúrir løgreglan fyri, hvat kann henda, um mótmælisfólk og løgreglan bresta saman. Í ruðuleikanum, sum tá verður, verður tað ivaleyst lættari hjá yvirgangsmonnum at gera seg inn á Bush, skrivar The Times.

Tey, sum skipa fyri mótmælisgongunum ímóti Bush, vænta, at minst 100.000 fólk fara at ganga mótmælisgongu, men løgreglan hevur boðað frá, at eingin sleppur at mótmæla nærhendis Parliament Square og stjórnarbygningunum í Whitehall.

Keldur í bretsku løgregluni siga við The Times, at amerikonsku myndugleikarnir hava sett krøv um trygdina í London í sambandi við forsetavitjanina, men at hesi vóru so umfatandi, at tey kundu als ikki góðtakast. Eitt nú kravdu amerikanararnir, at øll ferðsla í miðbýnum og fleiri kilometrar haðani skuldi steðga longu fleiri tímar, áðrenn Bush kemur til Bretlands.

Í London skal Bush hitta Tony Blair, forsætisráðharra,og hann skal eisini hitta Elizabeth drotning í Buckingham Palace.

# Tann gloymda kreppan

**Meðan heimurin vendir eygunum ímóti Irak, er støðan har norðuri í Uganda vorðin tann størsta menniskjaliga vanlagnan, sigur varaaðalskrivarin í ST**

UGANDA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Norðmaðurin Jan Egeland er varaaðalskrivari í ST. Hann hevur júst verið í afrikanska landinum Uganda, og tíðindini, sum hann hevur heimaftur við sær, eru ræðulig.

Uppreistrarfelagsskapurin, ið nevnir seg Harrans mótstøðuherur, herjar sivilfólkið við einari framferð, sum vit næstan ikki duga at ímynda okkum. Jan Egeland sigur við norska útvarpið, at uppreistrarmenninir høggja armar og bein av teimum, sum teir koma fram á. teir hava burturflutt fleiri túsund børn, sum annaðhvørt verða nýtt sum hermenn ella sum sex-trælir hjá uppreistrarmonnunum, sigur hann.

Seinni í hesum mánaðinum fer ST-aðalskrivarin, Kofi Annan, at biðja altjóða samfelagið um hjálp til tey neyðstøddu í Uganda og øðrum afrikonskum londum.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Eyðun Mørkøre:

## Nýggjur varaleiðari í Føroya Sparikassa



Stjórnin í Føroya Sparikassa hevur tilnevnt Eyðun Mørkøre í Havn til varaleiðara fyri deild Tórshavn, tvs. deildir Sparikassans í miðstaðarøkinum.

Eyðun er klaksvíkingur, sonur Ellu, f. Kallsberg, og Esmar Mørkøre. Hann er útbúgvin bankaassistentur í Føroya Banka í 1994, men hann byrjaði sama árið í Føroya Sparikassa. Fyrst var hann á deildini á Eiði, og síðani gekk leiðin á Innheintingardeildina, Privatlánsdeildina og Vinnulívsdeildina, sum tá var partur av deild Tórshavn.

Í desember 1999 var Eyðun settur sum leiðari av privatlánsdeildini í Tórshavn, og hann heldur fram í hesum starvi eftir tilnevningina til varaleiðara fyri deild Tórshavn.

Eyðun tók finansiel videreuddannelse í 1997, og í juni 2003 tók hann Finansakademiprógvið á Finanssektorens Uddannelsescenter.

Eyðun er 32 ára gamal, hann hevur búð í Havn síðan 1996 og er giftur við Guri, f. Hansen, úr Klaksvík, og tey eiga ein son.

Sára Svartá Sørensen:

## Ársins fotonæmingur 2003



Leygarkvøldið 8. november bleiv Sára Svartá Sørensen kosin Ársins fotonæmingur 2003 á Grand Park Hotel í Korsør.

Sára er av Argjum, dóttir Elin Svartá Sørensen og Niels Sørensen, málarameistara.

Hon er 23 ára gomul og hevur lært til fotohandlara í 3-aranum í SMS. Læru-meistari var Gissur Patursson.

Eftir at hava latið uppgávuna, sum var um kikarar, inn, fór hon til Danmarkar at forsvara hesa uppgávu.

Hon bleiv kosin "Årets elev 2003" av Fotobranchens Leverandørforening og Danmarks Fotohandlerforening.

Aftur at hesum fekk hon ein kekk uppá 10.000 krónur og ein avbera góðan kikara.

Hetta er fyrstu ferð at ein føroyingur fær hendan heiðurin.

### Dagurin

**13. november. Arcadius,** deyður í 437. Aðalborin maður, sum var í fylginum hjá vandalakonginum Geiserik. Tá ið tað kom upp, at hann var kristin, varð hann tikin av døgum.

Til minnis um

# Mariu Vágstún

**23. juli 1923 - 5.sept. 2003**



Ikki komu boðini heilt óvæntað, at okkara kæra gumma var farin. Gumma hevði ligið sjúk á sjúkrahúsinum í næstan eitt heilt ár. Kortini vóru boðini tung at fáa fríggjamorgunin 5. september, tá vit frættu, at hon nú var farin heim.

Gumma varð fødd og vaks upp heima á Sandi í Sandoy. Sum ung genta búði hon eitt tíðarskeið í Havn, har hon arbeiddi á Kondittaríinum. Seinni giftist hon til Klaksvíkar, har hon og maður hennara valdu at seta búgv.

Gumma var eitt gott og deiligt menniskja. Altíð var hon so glað, so blíð og harumframt var hon altíð so góð við øll, ið vóru rundan um hana.

Hon giftist við einum av okkara ommubeiggjum og varð harvið rópt gumma av allari familjuni.

Vit komu at búgva tætt við hennara heim; og hava síðan vit dugdu at ganga, runnið oman til hennara. Altíð var hon klár við einum drekkamunni og var altíð so áhugað í, hvussu tað gekk í okkara lívi. Spurdi altíð eftir okkara vinum, skúla og arbeiði. Tá ið vit fóru út aftur hiðani, høvdu vit altíð kensluna av, at tað ikki var nakað í heiminum, sum vit ikki megnaðu; hon fylti øll við sjálvsáliti og sjálvsvirðing.

Tvey børn átti gumma, Sigrun og Heðin, og trý ommubørn fekk hon eisini gleði av at fáa. Hesi komu at búgva í Danmark fyrstu árini, tískil halda vit, at hon eisini sá okkum sum hennara egnu ommubørn.

Tá ið vit vóru lítil, arbeiddi gumma á einum bakaríi mitt í býnum. Ongantíð gingu vit framvið, uttan at vit fóru innar at tosa við hana. Altíð vórðu vit væl móttikin, og ongantíð fóru vit útaftur, uttan at hon hevði givið okkum okkurt gott.

Gumma megnaði at fylla 80 ár, áðrenn hon fór heim til Jesus. Hóast 80 ár, sást tú ikki á gummu, at hon hevði livað í so nógv ár. Hon var so frísk og lívsglað, líka til sjúkan tók ræði á henni fyri einum ári síðan. Hóast hetta, hoyrdi tú hana aldrin gremja seg um sjúku.

Nógvar í tali vóru vinkonur hennara, so tað var týðuligt, at hon var væl dámd. Hetta sást eisini aftur í tíðini á sjúkrahúsinum, tí altíð vóru tær mangar í tali, ið vitjaðu hana, – líka til tað seinasta. Hesar sakna hana óivað nógv nú.

"Góða gumma. Takk fyri alt tú vart fyri okkum og alla familjuna. Vit sakna teg, men vit vita eisini, at tú vart móð og vildi sleppa heim. Tað er nú so tómt fyri okkum, at vit ikki longur kunnu fara at vitja teg, men ein dag síggjast vit aftur."

Má Harrin styrkja og troysta tykkum, ið eftir sita:

Julian, Heðin, Inga Maria, Sigrun, Bjarki og Rúni.

Ærað veri minnið um Mariu Vágstún.

**Bill, Jórun og Alberta**